**Mentamálaráðið**

## Starvsfólk til Próvstovuna

**Starvið**
Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum máls-viðgeri er leyst at søkja á Próvstovuni.

Próvstovan hevur ábyrgdina av at skipa fyri og leggja til rættis próvtøkur í fólkaskúla-, miðnáms- og hægri skúlum.

**Arbeiðið fevnir m.a. um at:**
- Seta uppgávunevndir og samskifta við tær um at gera, prenta og senda út próvtøku-uppgávur til skúlarnar
- Málsviðgera
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðs-uppgávur á Próvstovuni – innstilling til próvtøku, skemalegging, tekstuppgeving o.a.
- Saman við uppgávunevndum o.ø., gera próvtøkuuppgávur klárar til prentingar, skriva tekstir, gera uppseting (lay-out) o.a.
- Prenta, pakka og senda próvtøkuuppgávur til allar skúlar í skúlaverkinum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til próv-stovuna, t.d. samskifti við próvdómarar o.o.
- Avgreiða samsýning í sambandi við próvtøkur.

**Førleikakrøv**
**Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarin hevur:**
- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovu-yrkinum ella øðrum, ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv, eitt nú word, excel, access, power point, indesign og photo shop.
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at arbeiða undir tíðartrýsti.

**Vit bjóða**
- Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir
- Tað er eitt sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning
- Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og allar deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til: Mentamálaráðið, Postrúm 3279, 110 Tórshavn, ella sum teldupost til mmr@mmr.fo

**Umsóknarfreist**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. august 2010, kl. 16.00.
Starvið verður at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja til Bjarna Wilhelm, deildarstjóra í Mentamálaráðnum, tlf. 55 50 22.

*Mentamálaráðið fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan, og herundir eisini dagstovnaøki, kirkjumál og ítrótt. Mentamálaráðið er bygnaðarliga skipað við 4 deildum - fólkaskúladeild, vinnu- og miðnámsskúladeild, mentamáladeild og fyrisitingardeild.*
*Próvstovan er partur av fyrisitingardeildini í Mentamálaráðnum.*

## Stuðulsstarv við
### Kvívíkar skúla 2010- 2011

Søkt verður eftir fólki til 20 stuðulstímar um vikuna.
Umsóknir skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 25. aug kl. 15.00.
Nærri fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran, Bjarna Heinesen, á tlf. 772422.

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

## Akademiútbúgvingin Heysthálvan 2010

### Treytað av nóg stórari luttøku, verða í heyst hesar lærugreinar á Akademiútbúgvingini:

**TÓRSHAVN**

| | |
|---|---|
| HR | mánadagur |
| Sølubúskapur | hósdagur |
| Vinnubúskapur | hósdagur |
| Altjóða flutningur og flutningsjura | mikudagur |
| Altjóða búskapur | mikudagur |

Tilmelding á Føroya Handilsskúla í Tórshavn hsh@hsh.fo

**KAMSDALUR**

| | |
|---|---|
| Leiðaraskapur | hósdagur |
| Vinnubúskapur | hósdagur |

Tilmelding á Føroya Handilsskúla á Kambsdali fhk@skulin.fo

Undirvísingin byrjar í viku 35 og er eitt kvøld um vikuna í tíðarskeiðinum 18.00-21.20

**Tilmeldingarfreistin er 10. August 2010**

Innskrivingarseðil og kunning um Akademiútbúgvingina finnur tú á heimasíðu skúlans. Til ber eisini at venda sær til skúlan.

**Føroya Handilsskúla**
Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • 110 Tórshavn
Tlf 317177 • Fax 313374
www.fh.fo

